## Eldur kom í bátin



*Báturin rak inn á land her við Stevns og kolaðist upp*

(Mynd: DR)

Ein 43 ára gamal dani noyddist at leypa í havið, tá eldur kom í bát hansara úti fyri Rødvig nærhendis Stevns um vikuskiftið. Tað var so heppið, at sonur hansara var tætt við í einum øðrum báti, og hann tók pápan upp. Løgreglan sigur, at tann 43 ára gamli maðurin hevði júst lýst bátin til sølu, og at hann skuldi bara ein seinasta túr at vissa seg um, at báturin var í lagi. Tað bleiv tann seinasti túrurin, tí báturin kolaðist upp, sigur danska kringvarpið. Tilburðurin er ein vanlukka fyri eigaran, tí báturin var ikki tryggjaður.

## Triði hvør hevur livrabruna

Í Grønlandi halda læknarnir eitt vakið eyga við fólkinum í bygdini Itilleq, sum er tætt við Sisimiut, tí kanningar hava víst, at næstan ein triðingur av fólkinum í bygdini hava livrabruna. Ove Rosing Olsen, økislækni, vísir í hesum sambandi á, at í grannabygdini Sivdlek. hava bara trý prosent av bygdarfólkinum livrabruna. Hetta er ikki fyrstu ferð, at livrabruni ger um seg í Itilleq, tí tað hevur verið soleiðis líka síðani í áttati- og nítiárunum, sigur KNR.

# Jón Tyril: Ikki fíggjarlig fiasko

**- G! MINI livdi upp til sítt endamál, og vit varðveittu skinnið á nøsini, hóast vit høvdu væl færri áhoyrarar enn nakar hevði roknað við. Hetta sigur Jón Tyril um G! Mini, sum var um vikuskiftið**

G! MINI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hóast veðrið og fleiri aðrir faktorar ávirkaðu áhoyraratalið til G! Mini somikið nógv, at teir bara fingu helvtina av teimum áskoðarum, roknað var við, kláraði G! Mini at liva upp til sítt endamál. Tað sigur Jón Tyril í dag sum rættleiðing til grein í Sosialinum í gjár, har sagt var at tiltakið var ein fíggjarlig fiasko.

»Endamálið er at savnast við góðum tónleiki sum snúningsása og hava tað stuttligt og hugnaligt - gestir, tónleikarar og fyrireikarar saman, og so vóna vit at tað gongur so væl, at vit samstundis savna krút, kreftir, íblástur og pening til at fáa reist G! Festival aftur á føtur«.

Soleiðis ljóðar endamálsorðingin við G! Mini festivalinum, og hetta sigur Jón Tyril, at tey megnaðu til fulnar, hóast veðrið og aðrir faktorar ikki vóru til vildar.



*– Vit kláraðu at skipa fyri einum festivali fyri ein tíggjundapart av tí, sum G! Festivalurin kostaði seinastu trý árini, sigur Jón Tyril, fyriskipari og stjóri*

### Eingin inntøkuveitsla

Hóast allir tónleikararnir valdu at spæla ókeypis, eisini teir útlendsku, fór talan ongantíð at vera um nakra inntøkuveitslu.

- Tað einasta hetta merkir, er at vit megna at halda útreiðslunum niðri. Vit kláraðu í ár at skipa fyri einum góðum festivali fyri umleið ein tíggjundapart av tí, sum G! festivalurin kostaði trý tey seinastu árini. Men samstundis varð eisini lagt út við at royna at fáa 2000 áhoyrarar til tiltakið, í mun til 5000 ella 6000 áhoyrarar hini árini. Tískil minkaði inntøkukarmurin eisini munandi. Hartil hoyrir eisini, at vit bert sluppu av við umleið helvtina av teimum bilettum, vit upprunaliga settu okkum fyri at selja, staðfestir Jón Tyril.

Útreiðslurnar til festivalin í ár vóru umleið hálva millión, og tað er á leið tað sama, sum inntøkurnar blivu til, tá alt kom til stykkis.

- Um so var, at veðrið og aðrir faktorar høvdu verið við, so høvdu vit helst savnað millum hálva og eina millión í ein grunn ella partafelag til næsta ár, alt eftir hvør loysn hevði verið vald. Hetta var nakað, sum hevði gingið, um so var, at alt gekk heilt væl, til dømis um veðrið var við okkum, greiður Jón Tyril frá.

### Mangir løkir smáir

Hóast útreiðslurnar til G! Mini vóru lítlar, vóru tær bert lítlar í mun til undanfarin ár. Men har vóru nógvar útreiðslur hóast alt. Tónleikurin var ókeypis, men tað var útgerð og fyrireiking ikki. Umleið ein hálv millión varð brúkt til at gjalda fyri at kunna skapa nøktandi karmar um tiltakið. Hesin peningurin varð nýttur til ljóð, ljós, pall og frakt av palli, uppseting og smíðan, vaktarfólk, mat og drekka til tónleikararnar og ymiskt annað. Harumframt arbeiddu millum 5 og 10 fólk í vikur frammanundan við at fyrireika festivalin, og tey hava sjálvandi fingið løn fyri arbeiðið.

- Her eru ongar ógvusligar útreiðslur, men tilsamans geva allar hesar smærri útreiðslurnar eina samlaða útreiðslu á umleið hálva millión, og tað var áleið tað sama sum vit fingu inn. Tískil mól tiltakið akkurát runt, og tað haldi eg prógvar nakað positivt um, at tað ber til at skipa fyri festivali, staðfestir Jón Tyril, fyrireikari av G! og G! Mini at enda.